# Arnbjørn heldur fram

Eftir aðalfundin hjá Rithøvundafelag Føroya 30. mars 2008, hevur nevndin nú skipað seg. Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð heldur fram sum formaður, meðan Carl Jóhan Jensen og Zakarias Wang halda fram sum ávikavist næstformaður og kassameistari. Sólrún Michelsen, sum er nýggj í nevndini, verður skrivari, og Marjun Syderbø Kjelnæs heldur fram sum nevndarlimur. Tiltakslimir eru Rakel Helmsdal og Kim Simonsen, og tey eru bæði nývald. Nú eru 105 limir í felagnum.



religión og hvussu ein ikki-kristin klárar seg í einum kristnum samfelag. Tað, at vera fremmandur og royna at tilpassa seg. Sovorðin ting, sum eru aktuell allastaðni. Tað er ein svartur maður í einari siviliseraðari verð. Men tá alt kemur til stykkis, er tað hann, sum er tann mest siviliseraði, og tað er tann reina fasadan, ið borgaraliga samfelagið hevur, sum faktiskt er tann største kreppan.

- Hetta ikki ein klassisk uppseting av einum Shakespeare leiki, men tað er eisini ein partur av tí stuttliga við at gera hetta. Tað er altíð spennandi at sleppa at eksperimentera við klassiskum leikum. Og tá tú ert so væl á bylgjulongd við leikararnar, blívur tað bara betri.

### Hørð venjing

- Eg hevði ongantíð sæð hesi fólkini, fyrr enn eg hittist við teimum fyrstu ferð at tosa um leikin. Tey hava sum so ongan teknikk. Men tey hava eina rúgvu av vilja og entusiasmu. Tey vilja útfordra seg sjálvi, og skalt tú útfordrast, jamen so mást tú gera tað sjálvur. Tey eru eisini løtt at samstarva við. Tey lurta og vilja útvikla seg. Og alt hetta hevur elvt til, at projektið er blivið ordiliga professionelt við einum stórum budgetti. Tað er ein langur listi av professionellum fólki, ið eru involverað.

- Tey hava eisini arbeitt skidehart nú ígjøgnum tríggjar mánaðar. Men tað hevur ongantíð verið nakar, sum hevur grenjað ella verið skuffaður. Tey koyra bara á og pressa seg sjálvan. Og eg eri imponeraður, tí tey gera tað ólukksáliga væl. Faktiskt varð eg imponeraður av, at tey yvirhøvur kendu Shakespeare, so ung tey eru, sigur Hans, meðan smílibondini hála í vinstra munnklovan.

### At skapa eitt upplivilsi

- Tað hevur stóran týdning, at tey sleppa at útfolda seg. At mann ikki læsir tey inn í rammur, men letur tey sjálvi finna útav, hvussu tú gevur eitt upplivilsi víðari. At tú ikki endiliga skalt liva teg so ólukksáliga nógv inn í eina rollu, men at tú dugir at gera rolluna sjálvur, soleiðis at áskoðarin fangar tað. Tað kann nevniliga vera farligt at fara ov langt inn í teg sjálvan, tí tú kanst enda við at gloyma tann persónin, ið er við síðun av tær og skal taka ímóti tí, tú úttrykkir. Men hesir leikararnir klára tað væl. Tey hava kastað seg út, har tað er djúpast, men tey eru ikki druknað. Eg eri bara glaður fyri at sleppa at vera við til at hjálpa teimum at fáa hetta produktið framm, tí at hetta er líka mennandi fyri meg, sum tað er fyri tey.



*- Hetta er ikki nakar musikal, men totalteatur við dansi og tónleiki. Onkrastaðni hava vit koyrt allan tekst burturúr scenunum, og lata rørslurnar og tónleikin fortelja ístaðin. Jóna Thomsen er koreograf, og vit hava eitt fimm mans orkestur at framføra við okkum, greiðir Hans Tórgarð frá um uppsetingina av sjónleikinum*



*Ein av scenunum í Shakespeare-leikinum Othello, sum verður frumframsýndur í Sjónleikarhúsinum leygardagin*



*Hans Tórgarð er leikstjóri av leikinum Othello eftir Skakespeare og hevur skrivað leikritið við støði í umsetingini eftir Hanus Kamban*

## Nær og hvar?

Leikurin verður frumframsýndur í morgin, leygardag 3. mai í Sjónleikarhúsinum. Av tí at Sjónleikarhúsið eisini er útleigað til onnur endamál, vera einans 12 sýningar, og síðsta sýningin er tískil 14. mai.

## Hvør?

Leikararnir aftanfyri sjálvstøðuga leikbólkin »Huðrar« eru: Sóley Danielsen, Búi Rouch, Durita Dahl Andreassen, Dávur Djurhuus, Tjóðhild Patursson, Jákup Wardum og Edvard Skúvadal.
Tónleikararnir eru: Búgvi J. Magnusson, John Ivar Venned, Ísak Petersen, Mattheas Westerlund Kapnas og Kjartan Nolsøe Jespersen.
Hans Tórgarð er leikstjóri og hevur skrivað leikritið við støði í umsetingini av Othello eftir Hanus Kamban.
Jóna K. Thomsen er koreograf.